# <nýtt - nýtt>

## The Official Dance Chart vol. 3



**Heiti:** The Official Dance Chart vol. 3
**Bólkar:** Ace of Bace, Moby, Lutricia McNeal, DJ Aligator Project, Kim Wilde, Sinead O´Connor o.o
Dupult fløga
**Skeringar:** 20 + 20
**Plátufelag:** Edel-Mega Records

## Nu divas 2



**Heiti:** nu divas 2
**Bólkar:** Avril Lavigne, Pink, Atomic Kitten, Anastacia, Mary J. Blige o.o
**Skeringar:** 19
**Plátufelag:** BMG

## Julie



**Heiti:** Home
**Skeringar:** 12
**Plátufelag:** EMI

## Now Dance 2



**Heiti:** Now Dance 2
**Bólkar:** Justin Timberlake, Outlandish, Soulmagic, Musikk, Snap!, Dee Dee o.o
**Skeringar:** 19
**Plátufelag:** Now Music

## Guano Apes



**Heiti:** Walking on a Thin Line
**Skeringar:** 12
**Plátufelag:** Supersonic

## The Sum of All Fears



**Høvuðsleiklutir:** Ben Affleck og Morgan Freeman
**Longd:** 119 minuttir
**Prod. ár:** 2002

Ben Affleck er í høvuðsleiklutinum sum CIA-eftirlitsmaðurin, Jack Ryan í hesi spennandi filminum, sum er gjørd til bestseljaran hjá Tom Clancy.

Óttin fyri tí kalda krígginum í USA kemur aftur til lívs, tá tann russiski forsetin doyr, og verður eftirfylgdur av einum manni við eini kryptiskari fortíð. Men spenningarnar millum eystur og vestur brýtur út, tá CIA fær mistanka um, at russiskir vísindamenn eru við at útviklað fleiri atomvápn. Jack Ryan verður sett í aktion av CIA-stjóranum, William Cabot (Morgan Freeman) og fylgir einum vandamiklum spori til eina sjokkerandi niðurstøðu: Yvirgangsmenn leggja ætlanir um at framprovokera eitt kríggj millum USA og Russland við at spreingja eina bumbu meðan Super Bowl finalan er.

## Terror i høj fart




**Høvuðsleiklutur:** Jean Claude Van Damme
**Longd:** 85 minuttir
**Prod. ár**: ????

Jacques Kristoff er ein harður Nato-eftirlitsmaður við spesiali í kemiskari og lívfrøðiligari vápnafrøði. Nú er hann á veg til Eysturevropa fyri at smugla Galina Konstatin, ein altjóða kvinnuligur brotsmaður, til Týsklands. Hon hevur týdningarmiklar upplýsingar um eitt nýtt dreparavirus, SP-43.

Men onkur hevur fortalt um ætlanirnar. Tey koma beint inn í eitt bakhold. Tey koma við neyð og deyð í trygd umborð á einum ekspress-toki til München. Men umborð á tokinum bíðar heimsins ringasta marra, yvirgangsmaðurin, Manson Cole.

Galina sigur nú fyri Jacques, hví hon hevur brúk fyri einum lívverja. Ikki bara tí hon hevur upplýsingar um SP-43, men tí hon hevur eina nøgd av stoffinum uppi á sær. Fyri ein yvirgangsmann sum Cole er tað eitt supervápn...

## Skulls II




**Høvuðsleiklutir:** Robin Dunne, Nathan West, Ashley Lyn Cafagna og Lindy Booth
**Longd:** 95 minuttir
**Prod. ár:** 2002

The Skulls hevur fingið ummæli sum »Heitasti spenningsfilmur í býnum«. Nú kemur eftirfylgjarin, The Skulls II. Spenningurin byrjar tá ein onkivitandi lesandi verður tikin inn í løgnu undirverðina í loyniligastu losjuni í landinum.

Tà Ryan Sommers (Robin Dunne) verður limur í The Skulls, verður hann samstundis ávaraður um, at hann má ongantíð avdúka nakað um felagsskapin ella um teir maktfullu limirnar. Men tá Ryan verður vitni til eitt morð innanfyri privata økið hjá The Skulls, verður hann klárur yvir, at tættari hann kemur sannleikanum, jú vandamiklari verður tað.

Orðið bólkatrýst fær eina heilt aðra meining í hesum filminum...




## Michael Jackson gravar sína egnu grøv



Tá Michael Jackson bleiv ákærdur fyri pædofeli í 1993, rindaði hann 200 milliónir krónur fyri, at vitnisburðurin frá tí tá 13 ára gamla Jordy Chandler, ikki bleiv almannakunngjørdur. Pappírini, sum avdúka, hvat Jordy Chandler segði, hava ligið í einum kassa á einari dómaraskrivstovu í Los Angeles. Men herfyri eydnaðist tað einum bretskum blaðmanni at fáa hendur á innihaldinum í kassanum. Sambært Jordy Chandler var Michael Jackson sera ónæriligur við hann fleiri ferðir.

– Hann segði, at fyri tað um tað kundi tykjast skeivt, so var tað ikki sikkurt, at tað var tað kortini. Hann hevði kropsligt samband við meg fleiri ferðir, og tá eg segði, at mær ikki dámdi tað, svaraði hann, at øðrum dámdi tað, og so mátti tað vera eitt tekin um, at eg ikki var líka góður við hann sum hinir vinirnir hjá honum. Og so lat eg hann gera, sum hann vildi við meg, stendur at lesa í frágreiðingini hjá Jordy Chandler.

Og herfyri kom ein filmur eisini út, sum skuldi hava til endamáls at vísa aftur øllum pástandum um, at Michael Jackson er ein pædofil, men hesin filmur vísir júst tað mótsatta. Filmurin er gjørdur av Martin Bashir. Michael Jackson hevur svarað aftur við at lata ein av sínum vinum, Marc Schaffel, gera ein film, sum hann heldur upp á, vísir at Bashir er ein svíkjari. Men aftur her rennir poppkongurin seg í trupulleikar, tí Marc Schaffel hevur eina fortíð, har hann millum annað hevur framleitt hard-core pornofilmar har ímillum eisini bøssafilmar.

Sostatt er líkt til, at Michael Jackson er fangaður í sínum egna neti av lygnum. Og so er spurningurin, um hansara mongu milliónir fara at megna at bjarga honum burturúr trupulleikinum enn einaferð.

## Mariah Carey er fín upp á tað



Mariah Carey er og verður ein fín madamma. Hon hevði bílagt og goldið fyri eina viku feriu í einum knasandi flottum tropuparadísi á tí karibisku oynni Anguilla. Har eru allatíðina sjey tænarar og tríggir kokkar til hvønn gestin alt samdøgurið. Men bert tríggjar tímar eftir, at madamman hevði lent, pakkaði hon alt saman aftur og reisti av aftur oynni.

– Hatta var langt undir mítt støði, ljóðaði grundgevingin. Men hon fekk tó ikki sínar 250.000 krónur aftur.

## Robbie Williams og Kelly Osbourne



Tað hevur ikki tikið langa tíð hjá Robbie Williams at koma yvir Rachel Hunter, sum nýligani fór frá honum. Tey høvdu verið sama í eina tíð, tá eksdaman hjá Rod Stewart pakkaði og stakk av frá Robbie.

Men hann hevur longu funnið sær troyst. Herfyri var hann boðin til eina veitslu hjá Justin Timberlake frá NSYNC. Har byrjaði hann at práta við Kelly Osbourne, og tað gekk ikki long tíð, so vóru tey meira upptikin av at kyssast heldur enn at práta.

## Gwyneth Paltrow hjálpti arbeiðsfelaga



Ofta verður tikið til um Gwyneth Paltrow, at hon er so menniskjanslig og vanlig, hóast hon er ein mega-filmstjørna. Hon er ikki bangin fyri at tosa við tey ókendu. Og hon hevur arbeitt við upptøkunum til filmin Ted and Sylvia í New Zealandi. Har hjálpti hon einum arbeiðsfelaga frá filmsliðinum at vinna eina kapping. Viðkomandi hevði teknað seg til eina kapping, har tann sum hevði tann besta souvenirin frá einum kendum persóni við, skuldi vinna kappingina.

Og tit kunnu bara gita, hvør vann, tá hann kom har við Gwyneth Paltrow " i egen person".

## Arnold Schwarzenegger undir skurð



Herfyri varð hann skaddur, tá hann framdi eitt stunt undir upptøkunum til filmin Terminator 3. Men hann vildi ikki, at hann skuldi vera orsøk til at filmurin ikki helt tíðarætlanina, so tí bíðaði hann við at lata seg leggja undir skurð, inntil upptøkurnar vóru komnar í kassan. Men nú og í tær komandi tríggjar vikurnar má filmstjørnan so ganga við armi í fatli.

## Claudia Schiffer er mamma



Ikki var hann eldri enn eina viku gamal fyrstu ferð hann bleiv møttur av myndafólkunum hjá pressuni. Talan er um nýfødda sonin hjá Claudiu Schiffer og Matthew De Vere Drummond. Sonurin, sum vigaði 3.175 gram, hevur fingið navnið Caspar. Og hann svav væl og trygt í føvninginum hjá mammu síni, tá hon bar hann út úr sjúkrahúsinum.

Ein onnur heimskend fotomodell hevur eisini fingið eitt barn. Men hjá henni er tað nummar tvey. Talan er um australsku supermodellina Elle McPherson. Hon og maðurin, Arpad Bussons fingu eisini ein son. Hann var góð 300 gram størri enn tann hjá Claudiu og skal eita Aurelius Cy Andrea. Stóribeiggi hjá honum Flynn fylti fimm ár sjálvan Valentines Day 14. februar.

## Dennis Quiad aftur giftast



Meg Ryan og Dennis Quaid vóru gift í níggju ár, men so fór hon við Russel Crowe, og tað var endin á tí hjúnarbandinum. Og nú sær út til, at Dennis Quaid er komin víðari eisini. Hann er fallin fyri tí 20 ára gomlu Anna Poche. Og tað letur til, at tey bæði fara at giftast skjótt. Og hinvegin skal Russel Crowe eisini giftast skjótt, men tað verður ikki við Meg Ryan. Hann fór frá henni eftir sjey mánaðar.

So er bert at vóna, at Meg Ryan hevur notið teir mánaðarnar bæði væl og virðiliga, tí sum nú er, situr hon einsamøll – single.

## Halle Berry ísakøld um minni um pápa sín



Út at til letur tað til, at lívið hjá Halle Berry er heilt gott. Hon klárar seg avbera væl í sínum arbeiði, og er nógv eftirspurd til filmar. Hon hevur vunnið Oscar, og nú hevur hon eisini roynt seg í leiklutinum sum James Bond babe.

Men á privatlívinum sær tað ikki so ljóst út hjá Hally. Hennara fortíðarkenslur fingu hana aftur herfyri, tá pápi hennara andaðist. Hon sló hondina av honum, tá hann bukaði mammuna og systrina hjá Halle, tá hon var fýra ára gomul. Og hon hevur ongantíð fyrigivið honum. Tað vísti hon tann dagin, hann fór til gravar. Tá fór Halle í býin at brúka pengar saman við manninum, Eric Benet og dóttrini hjá honum, India.

## Britney er alt ov vill



Tað vóru tíðir, tá Britney Spears ikki fekk frið fyri mannfólkunum. Men nú er tann tíðin farin. Nú flýggja menninir, tá hon kemur ov nær. Tí hon er alt ov vill, siga fleiri.

– Lívið hjá Britney er alt ov langt úti til at vit kunnu vera saman, sigur sangarin Fred Durst, sum einaferð helt upp á, at hann var maðurin í lívinum hjá sangarinduni. Filmstjørnan Colin Farrell hevur eisini fingið nokk av henni, og hennara eks Justin Timberlake helt herfyri føðingardag. Tá unti hann ikki henni so mikið sum eitt eygnakast, og tískil endaði føðingardagsveitslan fyri hennara viðkomandi í úrtíð, tá hon fór grátandi heim.

## topp.10/fløgur

01. T.A.T.U – 200 km/h in the Wrong Lane
02. Eminem – 8 Mile More Music
03. Ymiskt – Nu Divas 2
04. Julie – Home
05. Ymiskt – Dancechart vol. 3
06. Robbie Williams – Escapology
07. Soundtrack – More Music From 8 Mile
08. Nik & Jay – Nik & Jay
9. Eminem – The Eminem Show
10. Christina Aguliera – Stripped

## topp.10/dvd

01. Sum of All Fears
02. Austin Powers – Goldmember
03. Minority Report
04. Blade II
05. Showtime
06. Ali G- AIII
07. Men in Black II
08. Sweetest Thing
09. Van the Man
10. 40 Days and 40 Nights

## topp.10/video

01. Sum of All Fears
02. Minority Report
03. Austin Powers – Goldmember
04. Ringenes Herre – The Fellowship of the Ring
05. Big Fat Liar
06. Men in Black II
07. Sweetest Thing
08. Scorpion King
09. 40 Days and 40 Nights
10. Skulls II

## topp.10/cd-rom

01. Command & Conquer – Generals
02. Battlefield 1942 – Road to Rome
03. Sims – Houseparty
04. Aerial Combat Manoeuvre
05. Battle Realms
06. Hitman 2
07. Sim City 4
08. Robin Hood – Defender of the Crown
09. Fifa 2003
10. Sims – Deluxe Edition